Her eru enn góð vinnulívsfólk

RØÐA Á JÓANSØKU
Finnur Johansen



Finnur Johansen

Gott kvøld, kæru vágbingar, kæru suðringar, kæru jóansøkugestir og vælkomin til jóansøkuhald her í Vági.

Hóast gingin er útvið hálvari øld, síðani tú flutti hiðani úr bygdini, so kenst tað, hvørja ferð tú vitjar aftur, sum at vera komin aftur á gamlar steinar. Her eigur tú so mong sporini, her vakst tú upp, her gekst tú í skúla, og her stóðst tú í læru.

Tann, ið er vaksin upp við Krosslið og í Toftum og gingið í skúla á Oyralagi, hevur hvønn dag ferðast um stóran partin av bygdini, og kennir hana tí sera væl.

Tær rennur í hug tær mongu ríku løturnar á Toftadunga, ella tá vit vetrardagar skreiddu á vatninum, á skoytum í bróttu brekkunum og á skíum uppi í Toftaryggjum og ikki minst tá vit marcheraðu runt og sungu um Toftasoldatar.

Tá vit sum stórir smádreingir fiskaðu kúving og avreiddu fyri fimm krónur spannina. Tað var annars størsta spann, eg havi sæð. Eg minnist, tá vit ljósu summarkvøldini vóru í fjørðinum og onkuntíð í góðveðrinum gloymdu okkum burtur, so fólk komu at leita.

Fyri útvið hálvtannað hundrað árum síðani broyttist samfelagið til eitt fiskivinnusamfelag, og hundrað næstu árini, mentist vinnulívið í stórum, kanska eina mest í Suðuroynni.

Men fyritaksemi í Suðuroynni er nógv eldri enn so. Fyri útvið tveyhundrað árum síðani, og tað er meira enn fimmti ár fyri at kongaligi handilin gavst við virksemi sínum, keyptu millum aðrar toftabóndin og gjørðabóndin bretska skipið Sally & Polly, sum ein vetur hevði staðið á hvalbiarsandi. Teir sleipaðu skipið suður til Vágs, drógu tað upp á Fløtuni Fríðu, umvældu tað og kolfatraðu tað av nýggjum. Teir róptu skipið Royndina Fríðu, sum millum annað varð nýtt til uttanlandssigling við Nólsoyar-Poul sum skipara.

Tá sagt verður, at vøggan hjá vinnulívinum í Føroyum stóð í Suðuroynni, var hetta ikki minst galdandi fyri Vág. Longu minni enn fjøruti ár eftir at Eddison hevði gjørt heimsins fyrsta elektricitetsverk, og minni enn tríati ár eftir at Keypmannahavn hevði fingið sítt fyrsta verk, høvdu vágbingar gjørt sítt egna elektricitetsverk, verkið í Botni.

Hetta tiltak broytti ikki einans fyritreytirnar fyri vinnulívinum, men gav tí heilt nýggjar møguleikar, sum ikki høvdu verið frammanundan, umframt at geva fólki hentleikar, ið gjørdi lívið hjá tí einstaka lættari.

Men ringar tíðir hava eisini verið. Í tríatiárunum fóru nógvar fyritøkur av knóranum, ikki tí at ov lítið varð fiskað, skipini løgu á fjørðinum full av fiski, men vánaligi heimsbúskapurin gjørði, at eingin tordi at keypa fisk. Tað vóru fyritøkur í Føroyum; sum tá bjargaðu sær undan húsagangi við at gera sína egnu peningaskipan. Aðrastaðni verða menn revsaðir fyri tílíkt, men í Føroyum reisa vit teimum minnisvarðar. Ilt er tó at meta um, hvussu samfelagið hevði sæð út uttan hesar menn.

Kreppuna í fimtiárunum, ið gjørdi at ein stórur partur av okkara vinnuføra fólki mátti av landinum at vinna sær til lívsins uppihald, høvdu vit ivaleyst skyldina av sjálvi. Tað vóru eisini teir, ið tá máttu taka ábyrgdina av tí, sum var farið fram.

Heldur ikki man nógv vera at ivast í, at vit sjálvi høvdu ábyrgdina av kreppuni í nítiárunum, tá føroyska samfelagið fór í fíggjarligt og moralskt forfall, tá tússundtals føroyingar máttu av landinum fyri at lívbjarga sær. Og eisini hesa ferð fingu vit hetjur. Fólk, ið so ella so áttu sín leiklut í, at samfelagið, eftir vitleysu fíggjarligu framferðina í áttatiárunum, kollsigldi, situr nú í almennum álitisstørvum.

Moralsku niðurgangstíðirnar í áttatiárunum við sínum skilaloysi og ábyrgdarloysi kostaði samfelagnum dýrt. Landskassin bjargaði bankunum, og soleiðis pengunum hjá nøkrum fáum, men hjá teimum, sum mistu hús og heim, tí tey gjørdust arbeiðsleys, var tað ein vanlukka.

Fólk fóru av landinum, tí tey høvdu mist alt, og tað vóru tey, ið lítið annað høvdu í viðføri enn eina milliónaskuld, men fólk, ið vóru betri fyri, fingu húsini fyri lítið og lætt. Tey ríku øktu sær um ognina og tey fátøku um skuldina.

Eftir kreppuna í nítiárunum varð, sum rætt var, farið undir at rudda út í stóra yvirkapasitetinum av flakavirkjum í Føroyum, men eg haldi at vit eiga eitt svar til góðar frá teimum, ið tá fingu ábyrgdina av vinnulívinum í Føroyum, um, hví landsins mest modernaða virki, fiskavirkið í Vági, varð stongt, og ikki slapp at halda áfram.

Suðringar hava ikki einans átt góð vinnulívsfólk, teir hava eisini átt og eiga framvegis góð fakfelagsfólk, sum ágrýtin og við hegni hava virkað fyri at løntakarar bæði á sjógvi og landi hava fingið sømilig kor, fakfelagsfólk sum framvegis virka fyri at bøta um livikorini hjá teimum, sum bara hava hendurnar at líta á.

Tað er gleðiligt at síggja at vinnulívið í Suðuroynni og ikki minst í Vági nú aftur stendur í fullum blóma. Tað sigur okkum, at her enn eru góð vinnulívsfólk.

Hetta vikuskiftið er jóansøkuhald í Vági.

Tíðliga í 1920 árunum fóru suðringar at halda jóansøku, sum í fleiri ár var einasta stevna av sínum slag, ið var hildin uttanfyri Havnina. Suðringar, ella nakrir av teimum, fóru til Havnar at halda ólavsøku, men tá í tíðini var tað langt at fara til Havnar, og ferðasambandið var heldur ikki tað, tað er nú. Tí gjørdu teir sína egnu stevnu, ið var hildin á jóansøku, annað hvørt á ár Tvøroyri og annað hvørt í Vági.

Jóansøkan, sum fyrstu 20-30 árini bara varð hildin ein dag, sjálvan jóansøkudag 24. juni, og síðani varð flutt til eitt vikuskifti, varð eitt ynski um hesu eini ferðina um ári at rista gerandisdagin burtur av sær, at sleppa undan at hugsa um allar dagligu skyldir, og hava tað stuttligt saman við øðrum.

Takk tit ið lýddu á, vágbingar, suðringar og jóansøkugestir, og tit útisetar, sum vitja heima, og latið okkum hava upprunaligu ætlanini við jóansøkuni, um saman at hava tað gott, í huga.

Øll góð ynski fyri Vág og Suðuroynna.

Góða jóansøku.

VIÐMERKINGAR

Tá sannleikin gerst ein plága!

Tórbjørn Jacobsen
mf., natoja@ft.dk

Ein grein um føroyskan vinnupolitikk festi av álvara í fjúsið fyri trimum vikum síðani. Alt fór upp at gala. Ætlingin við greinini var bara at fáa vinnupolitikkin hjá samgonguni inn á grynri vatn aftur, og tað tykist sum tað hevur eyðnast, um vit annars kunna líta á teir, ið sita við ábyrgdini, - eisini okkara vegna. Eitt annað mál tók seg upp í kjalarslóðini. Ymiskt er sum sagt verður. Men er ein flís farin av fullveldisgongdini orsaka av hesum, og sannleikin er vorðin ein samfelagsplága, so býður ikki í bøtur allíkavæl. Alt skræðnar innanífrá. Fallið er víst.

Ikki eitið á blástur, ið nú er á hvørjum geilarhorni. Hvør hani stendur og gelur og hevur eina meining um tey vidurskifti, sum umrødd vórðu í greinini: Fiskimenn og hornblásarar. Landsins vinnupolitikkur gjørdist knappliga viðkomandi. Harumframt eru bæði miðlar og politikkarar farnir at skifta orð um persónligu krøvini, ið eiga at vera sett teimum, sum sita í samfelagsins evstu sessum. Fólk varnaðust ein politiskan hjartafeil, bara av lítla eykasetninginum: **Ringt er at liva við einum løgmanni og einum fiskimálaráðharra, sum, orsakað av eini gloymdari fortíð, harið ilt var at skyna á mørkunum, ímillum einis egna og annara, ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum landi í heiminum, men at hava ein vinnumálaráðharra sitandi, sum gongur diamentralt ímóti samfelagsins og politisku áhugamálunum hjá størsta flokki í samgonguni, tað verður ikki tolt.**

Flestu lond, ið hava tikið fullveldi eftir seinra heimsbardaga, hava skriðið í skræðuni búskaparliga. Málið hevur verið hægri enn búkurin. Soleiðis er ikki í Føroyum. Politiskt frælsi og búskaparligt frælsi eru vorðin synonym. Ein alin av sama vaðmali. Ein fabrikerað politisk kreda, ið bara hevur sum endamál, at forða frælsistøkuni. Framtøkan móti frælsinum er treytað av hvussu fløðir og fjarar á landsins fíggjarlóg, sigur íhaldið, eisini tann parturin av íhaldinum, sum hevur latið seg í eina progressiva brynju.

Samgongan, sum var, hevði eitt greitt mál. Fullveldi. Nú er kámari fyri framman. Undirtónin er tó leiðin fram á republikkina. Semja man eisini vera um pseudomodellið, harið ein koloni skal prógva sítt lívførið, sum fullvelsisríki, áðrenn endaliga fetið verður trátt út í alheimin, - sum fulltøkur partur. Hetta krevur ikki so lítið. Av øllum. Serliga av politisku skipanini. Búskaparliga niðurlaging av donskum kraftføðri, eitt styrkt vinnulív, hvørs avkast vigar uppímóti hesum, ein progressiv mentan og eitt sterkt undirvísingar- & granskingarverk, ið heldur tjóðini á beinari leið, og harumframt ein sosialpolitikkur, ið er øllum til sóma.

Vinnulívið er nú á dagsskrá. Hetta er sjálvur mergurin og treytin fyri øllum lívi í oyggjunum. Skynsemi og stabilitetur eigur tí at eyðkenna allan vinnupolitikk. Bara soleiðis styrkir tú vinnuna og samfelagið. Tjóðveldisfloksins politikkur er greiður á hesum øki. Vatntætt skott skal vera ímillum vinnuna og hitt almenna virkið. Størsta einstaka hendingin í so máta var stuðulsmálið. Mikið rumbul stóðst av hesum í samgonguni. Fólkaflokkurin var, sum ein **sokallaður** liberalur flokkur, óvanliga tráur í royndini, at bróta lið á skottið. Tað varð kreppa. Hon loysnaði ikki fyrrenn í tinginum tá ið fleiri ting- & landsstýrismenn tjóðveldisfloksins, kropp av kroppi, hertóku røðarapallin, fyri at gera landsstýrismanninum í fiskivinnumálum greitt, at hin so væl kendi stuðulspolitikkurin nú endaliga var søga. Tástaðni loysnaði. Hvat ætlaða lógin hjá Jørgeni hevði spolað út av almennum krónum er ein temperamang-spurningur. Onkur hevur nevnt eitt tal omanfyri milliardina.

Málið um almennu virksøgnini, ið nú herjar á politiska pallinum, líkist stuðulsmálinum. Nú er tað ein grá eminansa, sum ígjøgnum Bjarna, roynir at sæta sær onkursvegna. Hansara ætlaða uppruna-orðing til samgonguskjalið vísti sjónliga hvør ætlanin var. Vit lótu okkum ikki taka av bóli. Heldur ikki hesaferð. Tí kravdu vit hesa nú so kendu orðingina ásetta í samgongusáttmálanum. Fyri at tryggja samfelagsatlitini og ikki atlitini, bara hjá eini lítlari elitu av føroyingum. Royndir hava verið gjørdar at kjálka seg frá hesi ásetingini aftur. Men vit vitstu frá stuðulsmálinum hvat ið kravdist fyri at koma aftur á beint. Tí skuldi alt hetta rokið til. Tjóðveldisflokkurin heldur rimmarfast um allar politiskar avtalur. Krevur tað sama av øðrum. Og nú tykist tað, sum at landsstýrismaðurin er kropin aftur til krossin.

Leiðin fram til fullveldi er ikki kámað av hesum turbolensinum. Tvørturímóti. Stabilitetur er lyklaorðið í øllum vinnupolitikki. Destabiliseringin hjá Bjarna hevur órógva í meira lagi, men nú skuldi friður verið aftur. Vinnan sleppur at liva sítt egna lív, leys av tilvildarligum politiskum signalum. Tá gagnar hon samfelagnum mest. Søgan hevur prógvað hetta. Tá ið politiska skipanin í Føroyum royndi seg sum vinnurekandi organ, kostaði hetta føroyska borgaranum milliardaupphæddir. Ongin orsøk er til at enturtaka somu mistøkini.

Ein fræls vinna, sum fær frið at grógva, við egnari uppdrift, er lykilin til niðurlagingina av imperialistiska kraftføðrinum. Av olmussuni. Er lykilin til javnstøðu í heiminum. Portugisiskir agentar skutu Amilcar Cabral hin 20. januar 1973. Hann var oddviti í frælsisrørsluni í Guinea-Bissaus. Á einum fundi hjá svenska javnaðarflokkinum, stutt fyri lívlátið, segði hann hesi kendu orðini: "Samhaldsfesti og eingin javnstøða er bara ein olmussa, og olmussir hava ongantíð stuðla undir nakran framburð, hvørki hjá eini tjóð ella menniskjum annars. Og trygd við ongari javnstøðu er tað sama sum autoritert patriarkat, verja ella beinleiðis kolonialisma. Hon stendur altíð í andsøgn til veruliga frælsi hjá tjóðum og menniskjum." Danska samhaldsfestið, sum føroyska íhaldið tosar um, er tí ikki annað enn torvmold, sum eisini hendan samgongan kann lempa burtur, hevur hon styril til tess.

Morðið í Sarajevo var ikki orsøkin til fyrra veraldarbardaga. Bara neistin sum festi í eina krúttunnu. Eykasetningurin í greinini: Fiskimenn og hornblásarar, er ein paralellur. Ikki í vavið, men í substansi. Hetta var bara ein óviðkomandi neisti, ið festi í eina bumbu, sum hevði ligið latent undir vatnskorpuni í áravís. Er ein flís farin av fullveldisgongdini av hesi orsøk, býðst ikki í bøtur allíkavæl. Harið sannleikin gerst ein plága, stendur einki uppi av sær sjálvum. Smiðirnir virka til fánýtis. Alt skræðnar av rotið innanífrá. Fallið er víst.

Ein góð søk vinnur altíð. Politikkarnir í samtíðini eru treytaðir av henni og ikki øvut. Var Lenin uppi á døgum tá ið Katharina ráddi fyri borgum, var hann í mesta lagi ein íðin framsøgumaður hjá russiska borgaraskapinum. Livdi José Marti tá ið bretar hersettu Havanna hevði hann uttan iva farið í part við spaniólum, - sum faðirin. Vóru Napoléon, Mirabeau, Danton ella Robespierre uppi á døgum tá ið Karlamagnus ráddi fyri borgum, høvdu teir havt leiklutin sum ignorantir húskallar. Hippaðu eplaveltir í útriðini á einhvørjum feudalslátri. Og var plebeiiski flokkurin ikki vorðin so máttmikil í øgiliga klassabardaganum í Roma, tá var Julius Cæsar ongantíð komin yvir um ánna Rubicon. Soleiðis er heimurin nú einaferð samanskrúvaður. Søguligu gapini skula brúkast. Tað skula politikkararnir í samtíðini syrgja fyri. Hvussu teir eita, tað hevur bara týðning í søguligu annalunum, í bókum sum fúnast, við tíðini.

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

Úrslitið av vættrakappingini hjá Føroya Heimavirkisfelag

TÍÐINDASKRIV
Føroya Heimavirkisfelag

Í várblaðnum hjá Føroya Heimavirkisfelag varð lýst við "vættrakapping". Lesararnir vórðu eggjaðir til at lata hugflogið fáa frítt at fara og tilevna uppskot til ein føroyskan "souvenir" vættur, 10 - 30 cm til støddar og tilevnaður úr mest møguligum náttúrutilfari.

Vinnarin fær í virðisløn eina ferð fyri tvey - langt vikuskiftið við Atlantsflog til Fjørukránna í Hafnafirði í Íslandi.

Freistin at senda inn var 15. juli og inn komu 9 uppskot.

Ein óheft 3-manna dómsnevnd varð sett at velja besta vættrauppskotið. Í nevndini sótu: Tórgerð Mørkøre, listhandverkari, Inga Simonsen, umboð fyri Menningarstovuna og Aase Bømler Olsen, listakvinna og umboð fyri ferðavinnuna.

Vinnari av kappingini gjørdist Fríðgerð Rasmussen, Garðsgøta 13, Argir. Dómsnevndin varð hugtikin av hennara vættri og gav honum á staðnum navnið ÁLVUR

Dómsnevndin gav ÁLVI hetta skoðsmál:

- Formgevingin væleydnað - eitt heilskapað úrslit
- Livandi andlitsbráð og hendur
- Lættur at handfara og at hava við sær
- Tilevnaður úr føroyskari ull í góðum litum
- Føroyskt eyðkenni: M y r k a m o r r e y ð trøyggja við hvítum ommupikki
- Hóskandi støddkann framleiðast í minni ella størri útgávu

Dómsnevndin metti innkomnu vættrarnar at vera sera áhugaverdar og vart tað ikki heilt lætt at kjósa ein vinnara. Fleiri av innkomnu vættrunum kundu eitt sett í framleiðslu sum "souvenir". Vættrarnir verða allir sýndir fram í sýnisglugganum hjá Hansemann Tórgarð á Káta Horninum í Havn um Ólavsøkuna frá leygardegi 27. juli til og við mikudagin 31. august.

Vit takka Atlantic Airways fyri stuðulin og ynskja Fríðgerð eitt gott langt vikuskifti á Fjørukránni.

Dómsnevndin. Høgrumegin: Tórgerð Mørkøre, í miðjuni: Aase Bømler Olsen, vinstrumegin: Inga simonsen